# Oddagrein

# MENN VELJA MENN

So hendi tað aftur, at løgtingið mannaði eina nevnd. Og tá vit siga »mannaði«, so skal tað skiljast bókstaviliga. Tí serkøna nevndin, sum løgtingið hevur sett at endurskoða vallógina, er mannað við 10 monnum og einari kvinnu.

Og sum hvørja ferð, tá slíkt hendir, so koma umberingarnar. Formansskapur løgtingsins kennir tað ikki sum sína ábyrgd at tryggja javnt kynsbýti, og flokkarnir duga heldur ikki at síggja, at tað skal verða teirra uppgáva. Úrslitið er, at vit eru líka vítt sum sítt, tá tað snýr seg um javnstøðu í hesi nevnd, sum skal tryggja okkum eina valskipan, sum millum annað skal verða trygdin fyri, at vit tryggja so gott kynsbýti á tingi, sum til ber.

Vit kunnu so bara taka undir við Demokratia, sum sigur, at tað hevði klætt formansskapinum í løgtinginum at broytt hesa ójøvnu samanseting, sum sendir eitt sera óheppið signal frá løgtingsins hægstu tign. Demokratia mælir til, at formansskapurin heitir á tey, sum innstilla nevndarlimir, um fyri hvønn nevndarlim at koma við tveimum uppskotum - einum av hvørjum kyni. Síðan má tað vera upp til formansskapin at seta nevndina saman, so kynsbýtið lýkur nútíðar krøv til javnstøðu. Hetta hevði verið ein máti. Hinvegin áttu tingbólkarnir sjálvir at funnið út av hesum, tí tað er so upplagt, at júst hendan nevndin, sum skal gera eina nýggja valskipan, hevur so neyva kynsliga samanseting, sum til ber.

Við seinasta løgtingsval øktist kvinnuliga umboðanin á tingi munandi. Nýggja valskipanin við einum valdømi er uttan iva ein týðandi orsøk til hetta, tí nú stendur øllum frítt at velja millum øll valevni í landinum. Gamla valskipanin var diskriminerandi upp á fleiri mátar. Ikki bara viðvíkjandi kvinnum, men flokkar verða beinleiðis valdir frá í ávísum valdømum. Eitt nú hevur Tjóðveldi ongan kjans havt í Vágum síðani 1958, og Sambandsflokkurin er altíð við sviðusoð í Sandoy. Tey fólk í hesum valdømum, sum velja hesar flokkar, hava ikki eitt frítt val. Somuleiðis er við kvinnuumboðanini. Kvinnurnar hava betur kjans at verða valdar við einum valdømi.



Men skulu kvinnur hava vald, so skulu menn missa vald - ella lata vald frá sær, og tað er eftir øllum at døma ikki so lætt. Her eiga politisku flokkarnir at taka seg saman og arbeiða eftir tí leisti, teir sjálvir hava gjørt, tí tað einasta demokratiskt rætta er, at vit stimbra skipanir soleiðis, at vit fáa fleiri kvinnur aktivar í politikki.

**Skulu kvinnur hava vald, mugu menn missa vald**



*Mynd: Finnur Justinussen*

## Lumpaði 20 krónur frá familjuni

Jan Hellesøe dugir meira enn at mata seg. Hann gandar. Ella kanska skulu vit siga, at hann lumpar fólk við snildum.

Jan Hellesøe hevur føroysk ættarbond, omma hansara var úr Føroyum, og hann hevur av og á vitjað familjuna her í Føroyum. Og tað var eisini her, at hansara yrkisleið sum gandakallur byrjaði fyri 14 árum síðani. Hann var til eina familjuveitslu og hevði lært seg at brúka eina eskju, sum kundi fáa smáar lutir av hvørva.

– So gekk eg runt í til familjuna og spurdi, um eg skuldi ganda eina 20 krónu burtur. Og tað gjørdi eg so, sigur Jan Hellesøe, sum fekk nøkur oyru burtur úr gandakynstrinum hetta kvøldið.

Síðani er hann komin víða sum gandakallur. Hann hevur famført nógv í Danmark og seinastu tvey árini hevur hann virkað í Las Vegas í USA. Nú er Jan Hellesøe staddur í Føroyum, og fríggjakvøldið ber til at uppliva hann á Hvonn í Havn. Har fer hann at vísa kynstur saman við føroyska gandakallinum Ásbjørn Berthelsen.

Og nú Jan Hellesøe er komin beinleiðis úr Las Vegas, hevur framførslan fríggjakvøldið fingið navnið "What happens in Vágsbotn...". Framførslan verður millum klokkan 20 og 23, og tað kostar 100 krónur at koma inn. Íroknað prísin er vælkomstdrykkur.



**Valskipan fyri bæði kyn**

KRISTIANNA WINTHER POULSEN
KJAK Á SÍÐU 12



**Javna kynsumboðan**

OLUFFA JOENSEN
KJAK Á SÍÐU 12

## Larry King takkar fyri seg

Hann er eitt tað kendasta andlitið í amerikanskum sjónvarpi. 76 ára gamli Larry King hevur seinastu 25 árini gjørt 50.000 interview, og hann hevur tosað við so kend fólk sum Marlon Brando, Nelson Mandela, Mikhail Gorbatjov, Paul McCartney, Bob Hope, Frank Sinatra, L. Ron Hubbard, Madonna og Martin Luther King Jr.

Men nú skal tað steðga. Larry King Live fer í heyst í søguna á sjónvarpsrásini CNN.

– Fyri 25 árum síðani tosaði eg við guvernørin í New York í fyrstu Larry King Live sendingini, og nú ártíggjund seinni havi eg tosað við fólkini í CNN og sagt teimum, at eg ynski at gevast. CNN hevur gingið mínum ynski á møti, sigur Larry King Live á Twitter síðuni hjá sær.

CNN harmast, at teirra kendasti vertur gevst, men tey vóna, at Larry King vil átaka sær onkrar serligar uppgávur av og á.



**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo
**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo
**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814, aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo
***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*